## Svartur november hjá Sivic

November mánaður var einki serligur fyri fyrrverandi VB-, B36- og KÍ-venjaran, Tomislav Sivic, sum nú er venjari hjá Kecskemét í bestu ungversku fótbóltsdeildini. Kecskemét hevur annars tikið øll á bóli við eini framúr byrjan, men í november eydnaðist bert at fáa tvey stig burtur úr trimum dystum. Tomislav og hansara menn liggja tó framvegis væl fyri í stríðnum um europisk atgongumerki. Teir hava 21 stig eftir 15 dystir, og tað eru bara trý færri enn Haladás, sum er á fjórða plássinum í deildini.



## Valencia í fíggjarneyð

Spanska stórfelagið, Valencia, er um at fara á húsagang. Spanskir miðlar skriva, at felagið í løtuni samráðist við peningastovnar um at endurfíggja part av skuldini hjá felagnum. Júst í løtuni er hetta tó lættari sagt enn gjørt, og tí er ítøkiligur vandi fyri, at felagið skal rinda 375 milliónir undan ársskiftinum. Teir pengarnar hevur felagið ikki tøkar, og tí kann endin verða, at felagið verður kravt á húsagang. Í summar segði leiðslan í felagnum annars, at fíggjarliga støðan var sterk. Og hóast Real Madrid var til reiðar at rinda ovurhonds stóra upphædd fyri David Villa, segði felagið nei-takk.

# Pytlick satsar uppá ungu spælarnar

**Venjarin hjá danska kvinnulandsliðnum hevur tikið út sjey debutantar til EM-endaspælið, sum byrjar í morgin**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Danska kvinnulandsliðið, sum fór frá sigur til sigurs báðumegin aldarskiftið, hevur verið í aldudalinum seinastu árini. Jan Pytlick gavst, sum landsliðsvenjari í 2005, men nú stendur hann aftur á odda fyri donsku kvinnunum, sum skulu spæla ímóti Fraklandi í fyrsta dystinum í EM-endaspælinum. Dysturin byrjar kl. 19.15 í annaðkvøld. Hini liðini í innleiðandi bólkinum eru Rumenia og Ungarn. Jan Pytlick stóð á odda fyri danska liðnum, sum vann olympiskt gull í Sidney í 2000, og í Athen í 2004. Pytlick vann eisini evropameistaraheitið við donsku kvinnunum í 2002. Harumframt vann Pytlick silvur til EM-endaspølini í 1998 og í 2004.

Jan Pytlick hugsar ógvuliga langsiktað, tí hann hevur tikið út heilar sjey spælarar, sum ikki hava roynt seg í einum OL, HM ella EM-endaspælið fyri A-landslið áður. Gitte Aaen, Lotte Grigel, Lærke Møller, Camilla Dalby, Maibritt Kviesgaard, Susan Thorsgaard og Christina Pedersen koma allar at taka lut í sínum fyrsta endaspæli fyri A-landslið.

Mest spennandi av hesum nýggju spælarunum er playmaker-duettin, Lotte Grigel og Lærke Møller, sum eru ávikavist 17 og 19 ára gamlar. - Eg kenni ikki nakað trýst á okkum. Vit hava jú Katrine Fruelund og Rikke Skov á vinstra bakki, sum kunnu stuðla okkum sigur LotteGrigel við danska TV 2.

Pytlick hevði ikki rúm fyri tí rutineraðu Mette Sjøberg. Ikast-Brande spælarin hevur havt trupuleikar við rygginum seinastu mánaðarnar.



*Katrine Fruelund er ein av spælarunum, sum skal bera nógv, nú danir seta nýtt fólk við á kvinnulandsliðnum*
*Mynd: Polfoto*

## Danski hópurin

**Málverjar**: Karin Mortensen, Christina Pedersen
**Vinstri vongur**: Henriette Mikkelsen og Gitte Aaen
**Vinstri bakkur**: Rikke Skov, Trine Troelsen og Katrine Fruelund
**Playmaker**: Lotte Grigel og Lærke Møller
**Høgri bakkur**: Louise Mortensen og Camilla Dalby
**Høgri vongur**: Josephine Touray og Maibritt Kviesgaard
**Strikuspælari**: Lene Lund Nielsen, Kamilla Kristensen og Susan Thorsgaard

## Huntelaar til Real Madrid

**25 ára gamli Ajax-spælarin verður avloysarin hjá langtíðarskadda Ruud van Nistelrooy. Í januar skiftir hann til Real Madrid, sum má gjalda Ajax 200 milliónir krónur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skaðin hjá Nistelrooy hevur ikki gjørt tilveruna lættari hjá kongaliga felagnum í Madrid, sum als ikki hevur staðið arvafíggindunum úr Barcelona mát í ár.

Nú er tó greitt, at ein annar hollendingur avloysir van Nistelrooy, tí í januar mánaðir skiftir Klaas Jan Huntelaar úr Ajac til Real Madrid fyri 27 milliónir eurur, svarandi til 200 milliónir krónur.

25 ára gamli Huntelaar hevur leingi verið undir sjóneykuni hjá fleiri europiskum stórfeløgum, men púrasta óávirkaður hevur hann støðugt banka mál inn fyri Ajax. Í Ajax hevur hann í 224 dystum skotið ikki færri enn 167 mál. Og hóast hampuliga feskur í landsliðshøpi, so hevur hann her skotið 10 mál í 16 dystum.

Tað hevur verið nóg mikið til at sannføra Real Madrid, sum við sáttmálanum hevur tryggjað sær spælaran fram til 2013.

Huntelaar verður sætti hollendski spælarin í verandi hópinum hjá Real Madrid. Hópurin telur undan hesum Ruud van Nistelrooy, Wesley Sneijder, Rafael van der Vaart, Arjen Robben og Royston Drenthe.



*Fleiri europisk stórfeløg hava ligið fram við eftir undirskriftini hjá Klaas Jan Huntelaar seinnu árini. Nú verður tað so í Real Madrid, at hann skal royna seg*

# Svøríki snávaði ímóti Hvítarusslandi

**Russland er komið væl frá byrjan. Týskland vann á makedonsku vertunum**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í gjárakvøldið byrjaði EM-endaspælið í kvinnuhondbólti í Makedonia. Svenska kvinnulandsliðið, sum hevur livað í skugganum av norsku og donsku avrikunum seinastu 20 árini, fekk eina sera vánaliga byrjan uppá EM-endaspælið. Tað varð mett, sum sjálvsagt, at Svøríki fór at vinna á Hvítarusslandi, sum varð mett at fara at verða botnproppur í bólki C. Aftaná 1. hálvleik førdu svensku kvinnurnar 13-7, men í 2. hálvleiki datt tað svenska spælið saman, og tað eydnaðist hvítarussisku kvinnunum at stríða seg til ein 21-21 javnleik, og varð fagnaðurin stórur hjá Hvítarusslandi, tá stigið varð komið í hús. Svenskir miðlar samanbera kiksarin í kvøld við kiksaran hjá svenska íshokkilandsliðnum, á olympisku vetrarleikunum í Salt Lake City í 2002, tá Svøríki tapti fjórðingsfinaluna ímóti júst Hvítarusslandi.

### Russland væl í gongd

Í sama bólki vann Russland ein tryggan 31-22 sigur á Eysturríki. Hálvleiksstøðan varð 13-10 til Russland. Tær russisku kvinnurnar vóru serliga sterkar í kontraspælinum, har tær settu nógvar bóltar inn.

2000 áskoðarar møttu í Skopje til grannauppgerðina millum Kroatia og Serbia. Kroatia vann 30-26. Í 1. hálvleiki rann Kroatia Serbia um koll. Hálvleiksstøðan varð heili 17-8 til Kroatia. Serbia kom frægari inn í dystin í 2. hálvleiki, uttan tó at hótta Kroatia. Týskland vann 25-22 á vertstjóðini, Makedonia. Týskland varð á odda 11-10 í hálvleikinum. Danmark og Noreg skulu í eldin í annaðkvøld. Í bólki A spælir Danmark ímóti Fraklandi kl. 19.15. Í sama bólki spæla Ungarn og Rumenia kl. 17.15. Í bólki B spælir Noreg ímóti Spania kl. 18.15. Kl 16.15 spæla Portugal og Ukraina.